# Skips Sosialurin
## - TÍÐINDI TIL SJÓFÓLK





**Nú er tað gjørligt hjá okkara sjófólki at fylgja við hvat hendir**

Fá ein heilan Sosial sum e-mail, hvørja ferð hann kemur út.

Henda útgáva er gjørd á ein slíkan hátt, at hon fyllir minst møguligt og tískil skjót at heinta niður. Hetta er gjørt við at grafikkurin er tikin burtur, so einans teksturin er eftir og síðani pakkaður niður. Blaðið er sjálvútpakkandi á telduni og verður lisið við browsara, umframt at møguleiki er fyri at skriva alt blaðið út.

Útgávan er serliga ætlað okkara sjófólki, ið hevur atgongd til e-mail umborð á skipinum.

Stuðlað Skips Sosialin hevur

KAUPTHING
Føroyar
Virðisbrævameklarafelag

Tíðindablaðið
Sosialurin Box 76 110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

*Undirritaði teknar seg sum haldara av Skips - Sosialinum og fái fyrsta mánaðin ókeypis*

Navn á skipi:
Kontakt pers.:
e-mail:
Undirskrift:

**Hava tygum spurningar í hesum sambandi ring 213982**
**ella e-mail:** *skipssosialurin@sosialurin.fo*

☐ *Tekst útgáva*
☐ *HTML útgava ( uttan útskrift )*
☐ *HTML útgáva ( við útskrift )*

Sosialurin






*- Tað var ein vøkur sjón at síggja nýggju Beta-skipini, Bak og Stelk, stevna inn um Saltnes, segði býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen í røðu síni, tá ið móttøkan var fyri nýggju ísfiskatrolarunum sunnudagin*

# »Tað er sum havaldan sjálv…«

**- Stundum er stilt, og alt gongur eftir vild, og stundum eru brotasjógvar og nógvur mótvindur. At fiskiskapurin er misjavnur, hava vit lært at liva við, segði býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, tá ið hann beyð Baki og Stelki vælkomnum sunnudagin**

MÓTTØKA
*Vilmund Jacobsen*

Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavíkar kommunu, helt móttøkurøðuna seinnapartin sunnudagin, tá ið nýggju Betaskipini, Bakur og Stelkur, løgdu til bryggju í Saltangará.

- Fyrst av øllum vil eg ynskja reiðarínum hjartaliga tillukku við skipunum og bjóða teimum at vera vælkomnum.

Hann vísti á, at tað var ein sera vøkur sjón at síggja Bak og Stelk koma inn um Saltnes.

- Og vónandi verður tað bert ein stór vika, til vit aftur síggja skipini koma inn um aftur - tyngri í sjónum.

## Havaldan sjálv

- Dagurin í dag verður mintur sum ein av teimum, har fiskivinnan aftur gjørdi stór framstig. Hesaferð var tað reiðaríið, Beta, sum uttan serligan háva, men helst sera gjølla umhugsað, tók avgerð um at lata tvey nýggj skip byggja í Spaniu. Vit fegnast eisini um, at maskinverkstaðurin, FJM í Runavík, hevur verið við til at útvega ð verksmiðjuna, at Radiobúðin í Saltangará hevur latið tey nautisku tólini, og at Vónavirkið í Fuglafirði hevur gjørt trolini.

Og Rodmundur helt fram:

- Tað at vera virkin í fiskivinnuni, er sum havaldan sjálv. Stundum er stilt, og alt gongur eftir vild, og stundum eru brotasjógvar og nógvur mótvindur. At fiskiskapurin er misjavnur, hava vit lært at liva við.

Hann helt tað vera rós vert, at tað eru reiðaríir, ið hava slíkt árræði at seta gongd á nýggjar verkætlanir sum hesa.

- Karmarnir hjá manningini eru settir í hásæti, og hvør smálutur er væl gjøgnum hugsaður. At gagnnýta alt, sum kemur á troldekkið, er málið.

Rodmundur segði, at hjá Beta eins og øðrum reiðaríum hevur gingið upp og niður.

- Eg veit, at tað skulu sterkir herðar til at bera uppgangstíðir og niðurgangstíðir.

Hann vísti á, at tað aftur hesaferð er Olaf Olsen saman við sínum mongu góðu fólkum, ið hevur verið "motorurin" undir hesi mennandi framtíðar verkætlan, sum kemur at gagna øllum tí føroyska samfelagnum.

## Fram ella aftur

- Vit fegnast sjálvandi um, at Runavíkar kommuna hevur havt framskrúvu seinastu árini, tí einki er, sum eitur at standa í stað. Antin gongur fram ella gongur aftur. Vinnulívið her um okkara leiðir er sera virkið á øllum frontum. Øll ynskja at gera sítt til, at her verður gott at búleikast.

Rodmundur segði seg fegnast um, at tey, sum starvast í vinnuni, ár eftir ár mennast og áhaldandi gera betringar á vinnutól, soleiðis at arbeiðsfólk og sjófólk fáa bestu kor at virka undir.

Hann vísti á, at kommunan hevur havt ógvuliga gott og fyrimyndarligt samstarv við reiðaríið, Beta.

- Eitt av hesum førdi til landingarmiðstøðina á havnalagnum, sum hevur verið ein týðandi liður í menningini av felagnum. Í november 1996 varð landingarhúsið tikið í nýtslu, har Beta hevur sítt virksemi. Síðan tá hevur nógv virksemi verið í húsinum og við bryggjukantin við fólki úr allari oynni.

## Merkt Runavík

Býráðsformaðurin segði, at nýggju og stásiligu skipini eru ein sera vøkur sjón.

- Ikki kann sigast annað enn, at munurin millum hesi bæði skipini og gomlu Kuba-bátarnar er sera stórur. At nýggju skipini eru merkt, Runavík, eiga vit øll at vera errin av – og ikki minst tit, sum varða av.

Rodmundur segði, at býráðið ikki bert hendan dagin er errið at virkseminum hjá Beta.

- Tað eru vit hvønn einasta dag. Mítt ynski er, at samstarvið millum kommununa og reiðaríið kemur at styrkjast enn meira, okkum øllum at gagni.

Hann las síðan eina yrking upp, sum Edmund í Garði, sáli, skrivaði í 1957.

*Mín bátur er lítil, títt hav er so stórt.*
*Hoyr, Harri, eg rópi til tín!*
*Tá bárurnar bróta, og náttin er svørt,*
*O, lít tú í náði til mín!*

*Eg veit væl, at eina tín frelsarahond,*
*kann føra um havið mítt far.*
*Til vitarnir lýsa á kendari strond,*
*og havnina eyga mítt sær.*

*Ja, fylg okkum, Harri um hav og um fjørð,*
*og signa várt dagliga strev.*
*So prýði várt yrki ber fosturlandsjørð,*
*ta eydnuna tú okkum gev.*

*Mín bátur er lítil, títt hav er so stórt,*
*men Harri vár, tú ert várt ljós.*
*Tín stjørna oss lýsir, um náttin er svørt.*
*Tí sigla vit tryggastu kós.*

At enda ynskti Rodmundur Nielsen, at reiðarí, skiparar og manning saman seta sítt álit á hann, ið øllum valdar.

# Umbering til Hjalta

Í serblaðnum, Fiskur & Olja, næstsíðsta mikudag var áhugaverd samrøða við útróðrarmann um eitt nú gróður, fiskiskap og útlit.

Í samrøðuni vísti útróðrarmaðurin á, at okkara fiskifrøðingar fyri nøkrum árum síðan mæltu til eina árliga toskaveiði uppá nøkur fá túsund tons. Landsstýrið avgjørdi kortini at seta kvotuna eitt sindur hægri.

Síðan tók útróðrarmaðurin til, at "seinni kom ein kendur fiskifrøðingur úr Kanada til Føroyar og eftir nakrar øl á Café Natúr, fingu føroyingar at vita, at nógv meira toskur kundi veiðast undir Føroyum…"

Undirritaði, sum skrivaði greinina, ásannar, at málburðurin kann skiljast sum niðurgering av arbeiðnum hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Tað var ikki endamál-ið við greinini.

Sosialurin hevur fingið upplýst, at kanadiumaðurin og umboð fyri Fiskirannsóknarstovuna umrøddu støðuna hjá eitt nú toskastovninum hetta árið í tríggjar vikur - og ikki bara yvir nakrar øl á Café Natúr.

Fiski-og útróðrarmenn duga væl at taka til - uttan at nakað "óreint" neyðturviliga liggur aftanfyri.

Men eitt er blaðmál, har tú vandar tær um vendingarnar, eitt annað er messuprát.

**Vilmund Jacobsen**